Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina



# Bústaðarpolitisk átøk

## Uppskot um nýggjan bústaðarpakka fyri allar Føroyar

## Útvegan av egnum bústaði hjá fyrstuferð keyparum

Toftir 23. september 2024

# INNIHALD

1. Politiska bakgrundin fyri átøkunum
2. Bakgrundin fyri átøkunum
3. Endamálið við átøkunum
4. Stevnuskrá Sambandsfloksins um bústaðarmál
5. Bústaðarpakki - málbólkur, átøk, fíggingarleistur, lóggáva, umsiting og dømi um langtíðar fíggjarligar avleiðingar
6. Fígging av bústaðarpolitisku átøkunum
7. Samanumtøka - niðurstøða og tilmæli



# Politiska bakgrundin

# POLITISKA BAKGRUNDIN FYRI ÁTØKUNUM

**Kjarnuvirði og grundhugsjónir aftanfyri bústaðarpolitisku átøkini!**

- Liberalt uppskot og hálp til sjálvhjálp - og skal vera grundsúlan í bústaðarpolitikkinum hjá Sambandsflokkinum
- Sambandsflokkurin heldur, at bústaðarpolitikkur er grundarsteinurin undir familjuni
- Eiga sítt egnað heim - partur av føroysku bústaðarmentanini
- Sleppa inn á bústaðarmarknaðin og fáa hesa virðisøkininga og uppsparingina, sum er skattafrí, tá ella um henda verður kapitaliserað
- Handlifrælsi á lívsleiðini
- Hugsa langtsiktað um tín aldurdóm

*Sambandsflokkurin vil halda fast við hesi politisku kjarnuvirði og grundhugsjónir, tá talan er um bústaðarviðurskifti hjá føroyingum*

*Ein annar partur av liberalu grundhugsjónini er, at fólk taka ábyrgd av egnum lívi og ein høvuðsfyritreyt er, at tey fáa møguleikan til egnan bústað. Harvið tryggjar tað teimum neyðuga fíggjarliga frælsi til at tilrættaleggja teirra lívsleið og aldurdóm*

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina



# Bakgrund og endamál

# BAKGRUNDIN FYRI ÁTØKUNUM

- Tørvur er á minst 1.000 nýggjum búeindum (Kelda: Betri Banki 22. mai 2024)
- Ikki javnbjóðist møguleikar hjá serliga lág- og miðalløntum at koma inn á bústaðarmarknaðin
- Bústaðarmarknaðurin er undir stórum trýsti, eftirspurningurin er stórur og útboðið er ov lágt
- Bústaðarmynstrið í Føroyum broytist, smærri húski og harvið færri fólk pr. bústaðareind
- Uppá 10 ár er miðal sethúsaprísurin tvífaldaður, umframt at býlisprísurin er hækkaður munandi
- Føðitíttleikin er í fríum falli, møguliga er ein orsøk vantandi atgongd til egnan bústað
- Netto-fráflyting av føroyingum í bestu tíðum - nøkur øki í landinum hava ongan fólkavøkstur
- Landsins fíggjarpolitikkur forsterkar trupulleikarnar á bústaðarmarknaðinum - upphiting av búskapinum og tí óneyðuga kostnaðarmikið
- Húsabygging í útjaðaranum nærum ógjørlig at bankafíggja - uppskotið betrar møguleikarnar

# BAKGRUNDIN FYRI ÁTØKUNUM

**Føroyingar vilja eiga egnan bústað - ikki leiga frá øðrum!**

## Borgarakanning

| | |
|---|---|
| 86,6% | Ynskja egin sethús |
| 7,4% | Ynskja egna eigaraíbúð |
| 3,4% | Ynskja at leiga íbúð |
| 1,8% | Ynskja lutaíbúð |
| 0,8% | Annað |

Kelda: Kringvarpið - Spyr.fo

## Borgarakanning - bústaðir



# BAKGRUNDIN FYRI ÁTØKUNUM

**Bústaðarmarknaðurin virkar ikki nóg væl og gevur ikki javnbjóðis atgongd til øll!**

- Byggikostnaðurin er høgur, og krøvini til bankafígging eru hørð: Eginfígging 10%, og lánsupphæddin í mesta lagi 3,5 ferðir lønarinntøkuna, umframt hørð krøv til tiltøkupening
- Um ein bústaðareind kostar 3,5 mió. kr. at útvega, skal viðkomandi húski hava eginfígging upp á 350.000 kr, og eina ársinntøku upp á í minsta lagi 900.000 kr., áðrenn skatt
- Tey, sum sjálvi megna at fáa fígging og harvið kunnu útvega egnan bústað, fáa stuðul frá landinum til rentur og grønar orkuloysnir
- Tey, sum ikki megna at fáa fígging og harvið ikki kunnu útvega egnan bústað, mugu rinda høga leigu til Bústaðir, ella aðrar privatar útleigarar. Og hesi fáa ongan stuðul frá tí almenna

⇨ *# Bústaðarmarknaðurin er undir trýsti og krøvini til fígging hørð*

⇨ *# Tískil er tað í stóran mun fólk við hægri inntøku, sum megna at fíggja og útvega egnan bústað, hetta enntá við stuðli úr landskassanum*

⇨ *# Tí er trupult hjá nógvum ungum og barnafamiljum at koma inn á bústaðarmarknaðin, og mugu tey ístaðin rinda høga leigu, fáa ikki spart upp og koma ongantíð at eiga sítt egnað*

# ENDAMÁLIÐ VIÐ ÁTØKUNUM

- Ung og barnafamiljur fáa møguleika at sleppa á bústaðarmarknaðin - fyrstuferð keyparar
- Fólk, sum ikki eru á bústaðarmarknaðinum fáa betri møguleika at etablera seg
- Tey eldru fáa størri frælsi til at velja, hvussu tey skipað seg við bústaði á eldri árum
- Føroyar gerast kappingarførar - endamálið er at fáa føroyingar at velja Føroyar
- Minka um sosiala ójavnan millum fólk, herundir forða fyri, at børn og ung enda í fátækradømi
- Útjaðarin fær gagn av átøkunum

*Tað vilja altíð verða ávísir samfelagsbólkar, sum av ymiskum orsøkum ikki koma at fáa møguleika at útvega sær egnan bústað*
*Hesir bólkar skulu ikki sleppast upp á fjall, men hava lógartryggjaðan rætt til ein sosialt grundaðan býlisstuðul*

➡ *# Bústaðarátøkini eru ein liður í at føra ein góðan sosialpolitikk og venda sosialt rætt*

➡ *# Skapa betri bústaðarmøguleikar fyri lág- og miðal inntøkur*
*- serliga galdandi í Føroyum sum eitt lítið samfelag, har sosialir ójavnar gerast ógvuliga sjónligir*



Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# Stevnuskrá Sambandsfloksins

# STEVNUSKRÁ SAMBANDSFLOKSINS UM BÚSTAÐARMÁL

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

**Stevnuskráin um bústaðarviðurskifti**

- Sambandsflokkurin virkar fyri, at allar føroyskar familjur kunnu búgva í egnum húsum ella í egnari íbúð
- Haraftrat virkar flokkurin aktivt fyri at økja um útboðið av leiguíbúðum
- Sambandsflokkurin vil stuðla teimum ungu, ið skulu seta búgv, og hann vil hjálpa teimum eldru, at tey framhaldandi kunnu búgva í heimi sínum

**Viðmerkingar**

Allir føroyingar skulu hava møguleikar at búgva **í egnum húsum** ella í egnari íbúð

Fíggingin og lániviðurskiftini skulu skipast soleiðis, at allar fíggjarligar byrðar av egnum bústaði kunnu verða avhæsaðar eftir hóskandi áramáli, so at eisini tey gomlu hava ráð at verða búgvandi í sínum egna heimi, sum ikki eigur at verða tyngt av húsa- ella ognarskatti

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# Bústaðarpakki - høvuðselementir



# BÚSTAÐARPAKKI - HØVUÐSELEMENTIR

Samansetingin av skipanini

Skipanin krevur, at øll spæla við og saman - landið, bankar, kommunur o.o.



# MÁLBÓLKUR

- Fyrstuferð keyparar av bústaði
- Ung- og barnafamiljur
- Føroyingar, sum vilja sleppa inn á bústaðarmarknaðin



# BÚSTAÐARPOLITISK ÁTØK

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

- Stovna bústaðargrunn á 200 milliónur krónur, har fyrstuferð keyparar kunnu læna 5% til eginfígging av útvegan av bústaði, upp til 200.000 kr. - hóskandi afturgjaldstreytir
- Barnafrádráttin hækkaður við 1.000 kr. pr. mðr. pr. barn - til og við 7 ár
- Útgjaldið úr Barsilsskipanini hækkað upp til 40.000 kr. mðr.
- Fyrstuferð keyparar, sum fáa lán til egnan bústað, kunnu fáa upp til 50% av mánaðarliga pensjónsinngjaldinum útgoldið sum løn í 10 ár - hægri tøkupeningur
- Rentustuðulsskipanin verður umskipað og stuðulin skal eggja til at niðurgjalda skuld
- Inntøkugrundaður býlisstuðul til tey, sum leiga
- BK 17-byggikunngerðin møguliga tillagast
- Tíðaravmarkaður stuðul

**Ávirkan - eyka tiltøkupeningur**
- 2 fólk 35.000 kr., hvør við 2 børn undir 7 ár
2.520 kr. 50% av pensjón 12% + 2.000 kr. barnafrádrátt =
**4.520 kr. mðr. / 54.240 kr. árliga**

⇨ *# Bústaðargrunnur verður settur á stovn*

# FÍGGINGARLEISTUR TIL ÁTØKINI

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

- Stovnsfæið í Bústaðargrunnin skal lænast út til eginfígging, 5%
- Stovnfæið skal fíggjast við einum gjaldi álagt peningastovnunum - og hetta skal gjaldast í grunnin yvir eitt 10 ára tíðarskeið
- Serskattur á føroysku peningastovnarnar og tryggingarfeløgini á 7% - landið skal hava henda skattin eyka, sum kompensatión fyri hækking av barnafrádráttinum
- Hækkaða útgjaldið úr Barsilsskipanina skal um neyðugt fíggjast við hægri inngjaldi
- Fólk, sum fáa eyka løn í eitt tíðarskeið, fíggja hetta sjálvi, tí hetta er teirra egna pensjónsinngjald, sum verður flutt til løn í eitt tíðarskeið, upp til 10 ár. Skatturin av hesum partinum av lønini verður 40% og fer allur til kommunurnar, so tær onki missa
- Umskipanin av rentustuðlinum skal upp á sikt fíggja komandi býlisstuðul til leigu

# NÝGGIR SLÓÐBRÓTANDI MØGULEIKAR

1 # Við hesum átøkum fáa fyrstuferð keyparar møguleika til fylgjandi:

1) læna til eginfígging 5%, max. 200.000 kr.

2) fáa part (max. 50%) av pensjónsinngjaldinum í eitt 10 ára tíðarskeið

Hesi átøk hava við sær eina hægri inntøku, ímeðan tey skulu etablera seg og hava brúk fyri pengunum

2 # Tú fært størri frælsi til at velja, hvussu tú skipar teg við bústaði á lívsleiðini - og minkar um sosiala ójavnan á eldri árum

3 # Tryggjaður verður ein býlisstuðul, sum er sosialt grundaður

# DØMI UM LANGTÍÐAR FÍGGJARLIGAR AVLEIÐINGAR

| Lánstreytir | |
|---|---|
| Miðalprísur fyri sethús, 140 kvm | 3.500.000 kr. |
| Eginfígging 10% | 350.000 kr. |
| Afturgjaldstíð | 20 ár |
| Marknaðarrenta ultimo 2024 | 4,5% |

**Leigutreytir**: Leiguíbúð: 100 kvm. - 12. 000 kr. mðr.

**Sethúsa- og býlisprísir**

| | | Ár2003 | Ár 2023 | Vøkstur | Vøkstur |
|---|---|---|---|---|---|
| Miðalprísur | Hagstova Føroya | 991.610 | 2.688.000 | 1.696.951 | 5,1% árliga, (3,5%) |
| Prístalsvøkstur, býli | | 100 | 155 | 55 | 2,2% árliga |



## Samanbering kostnaður - keyp ella leiga




## Samanbering ognarstøða - keyp ella leiga




Kelda: Menta og egnar útrokningar

# UMSITING AV BÚSTAÐARSKIPAN

- Bústaðargrunnurin umsitast av Bústøðum
- Pensjóns-/lønarútgjaldið umsitast av Taks
- Býlisstuðulin umsitast av Almannaverkinum
- Bústaðargrunnurin skal vera partur av landsroknskapinum



# LÓGGÁVA

- Broytingar í ásetingarlógini um hægri barnafrádrátt
- Broytingar í skattalógini um serskatting av peningastovnum og tryggingarfeløgum
- Broytingar í lógini um barsilsskipan um møguliga javning av inngjaldinum
- Broytingar í eftirlønarlógini og rentutryggingarlógini um pensjónsinngjald flutt sum løn
- Nýggja skipanin verður at galda frá 2025/ 2026



# BÚSTAÐARPAKKI - HØVUÐSELEMENTIR

## Samanumtikið

- Broytingar í ásetingarlógini um hægri barnafrádrátt
- Broytingar í skattalógini um serskatting av peningastovnum og tryggingarfeløgum
- Broytingar í barsilslógini um møguliga javning av inngjaldinum
- Broytingar í eftirlønarlógini og rentutryggingarlógini um pensjónsinngjald flutt sum løn
- Nýggja skipanin, galda frá 2025/ 2026

- Fyrstuferð keyparar av bústaði
- Ung- og barnafamiljur
- Føroyingar, sum vilja sleppa inn á bústaðarmarknaðin




- Bústaðargrunnur veita 5% í eginfígging
- Landið hækka barnafrádráttin fyri øll, 1.000 kr.
- Hækking av útgjaldinum úr BAS, 40.000 kr.
- Pensjónsútgjald partvíst útgoldið sum løn í 10 ár
- Rentustuðulsskipanin umskipast
- Inntøkugrundaður býlisstuðul til leiguútreiðslur

- Bústaðargrunnurin umsitast av Bústøðum
- Pensjóns- og løgarútgjaldið umsitast av Taks
- Býlisstuðul umsitast av  Almannaverkinum
- Bústaðargrunnurin partur av landsroknskapinum

- Stovnfæ í Bústaðargrunn - gjald álagt peningastovnunum
- Serskattur á peningastovnar og tryggingarfeløg á 7%, til landið
- Rentustuðulsskipanin umskipast - skal fíggja býlisstuðul
- Meirskattur frá pensjóns-/lønarútgjaldi 40%, til kommunurnar



Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# Fígging av bústaðarpolitisku átøkunum

# FÍGGING AV BÚSTAÐARPOLITISKU ÁTØKUNUM

- Uppskotið skal vera útreiðsluneutralt fyri landskassan
- Landið hækkar barnafrádráttin, eyka útreiðslur 50 mió. kr.
- Serskattur á peningastovnar og tryggingarfeløg, umleið 50 mió. kr.
  - 4 peningastovnar og
  - 2 tryggingarfeløg á marknaðinum at býta upphæddina
- Býlisstuðulin verður fíggjaður við umskipan av rentustuðlinum



*Serskattur og avgjald á peningstovnar og tryggingarfeløg og meirskattur frá pensjóns-/lønarútgjøldum, fer ikki til nakrar meirútreiðslur hjá landskassanum ella landinum, men fer beinleiðis til borgaran*



# Samanumtøka

# SAMANUMTØKA

**Niðurstøða**

- Tørvur á minst 1.000 nýggjum búeindum
- Fyrstuferð keyparar, ung og barnafamiljur, sleppa ikki framat bústaðarmarknaðinum
- Málbólkurin lág- og miðallønt hava serliga trupult við at sleppa framat bústaðarmarknaðinum
- Eldri fólk, sum ongantíð hava átt egnan bústað, verða fasthildin í einum sosialum ójavna, um tey ikki fáa ágóðan av at hava átt egnan bústað
- Verandi skipan nøktar ikki tørvin

**Tilmæli**

- Sett verða í verk ítøkilig bústaðarpolitisk átøk og ein skipan, sum ger tað møguligt hjá fyrstuferð keyparum at ogna sær egnan bústað
- Bústaðarpolitisku átøkini skulu verða fult fíggjaði og langtíðarhaldfør
- Nýggja skipanin verður sett í verk frá 2025/ 2026

Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

# Takk!